# Nýggj vakstrarstøð

Í sambandi við árinskanningina av Eiði 2 vatnorkuútbyggingini, sum bleiv gjørd á sumri 2007 av økinum frá Eiðisvatni og suður til Selatraðar, bleiv lyngjavni endurfunnin. Hann er ikki sæddur síðan 1903. Sóldøgg bleiv funnin har á fyrsta sinni og baraldur bleiv funnin á fleiri støðum, ið Náttúrugripasavnið ikki hevur havt vitan um áður.



**Lyngjavni (*Lycopodium annotinum*)**
Plantan er bert funnin eina ferð í Føroyum, og tað var í Svínáum í 1896. Henda planta er til skjals á Botanisk Museum í Keypmannahavn.

Hon er pólkringin (*circumpolær*) og finst bæði sunnan fyri og norðan fyri okkum. Lyngjavni er friðaður í ávísum pørtum av Skandinavia, har heitt verður á fólk um ikki at taka hann, tí hann veksur ógvuliga seint. Plantan er á reyðlista í Føroyum.

**Rundblaðað sóldøgg (*Drosera rotundifolia*)**
Fyrsta skráseting av plantuni er frá 1867, og varð hon tá funnin við Gróthúsvatn í Sandoy. Henda planta er til skjals á Botanisk Museum í Keypmannahavn.

**Lyngjavni (*Lycopodium annotinum*).**



Rundblaðað sóldøgg (*Drosera rotundifolia*).



Vanligur baraldur (*Juniperus communis*).

Rundblaðað sóldøgg er ein av okkara skordýraátnu plantum. Hon veksur í mosa í mýrum. Útbreiðslan av plantuni á norðari hálvu er pólkringin. Plantan er á reyðlista í Føroyum.

## Vanligur baraldur (*Juniperus communis*)

Fyrsta skráseting av plantuni, ið er til skjals á Føroya Náttúrugripasavni, er frá 1920, og varð hon tá funnin á Kirkjubøreyni. Onnur skráseting er frá 1924 úr Svínoy. Lítið er til av baraldi á teimum fáu økjunum, har vit finna hann, oftast bert einstakar til heilt fáar plantur á hvørjum plássi. Størsta skipanin er at finna í Svínoy. Oftast er plantan at finna uppi á stórum klettum í hamrum undantikið í Svínoy og á Kirkjubøreyni, har hon veksur í vátlendi.

Baraldur hevur verið nógv vanligari í Føroyum fyrr. Plantusáðkanningar vísa, at baraldur var í stórari afturgongd fyri landnám, helst orsakað av veðurlagsbroytingum, og tá ið fólk búsettust her, minkaði hann uppaftur meira. Tað, sum eftir er av baraldi, hevur verið rímiliga støðugt. Mett verður ikki, at seyður ger stórvegis skaða á barald.

Útbreiðslan av vanligum baraldi er pólkringin bæði norðan fyri og sunnan fyri okkum. Baraldur er á reyðlista í Føroyum.

### Reyðlisti

Altjóða náttúrufriðingarstovnurin IUCN gjørdi ein sokallaðan reyðlista í 2001 við 9 ymiskum flokkingarbólkum, harav tríggir eru sonevndir hóttir bólkar. Plantur og djór skulu lúka ávísar treytir fyri at koma í ein ávísan bólk. Bólkarnir eru:

- **Útdeytt**
- **Útdeytt í Føroyum**
- **Sera hótt**
- **Hótt**
- **Viðbrekið**
- **Nærum hótt**
- **Ikki hótt**
- **Dátutrot**
- **Eingin meting**

Eitt nýtt yvirlit yvir fuglar og plantur, ið er gjørt eftir reglum hjá IUCN vísir, at tað í Føroyum eru 54 sløg av fuglum og 74 sløg av plantum, sum eru í vanda fyri at doyggja út. Sí annars www.ngs.fo



**Anna Maria Fosaa**

anmarfos@ngs.fo
Náttúrugripasavnið



**Magnus Gaard**

magnus.gaard@skulin.fo
Náttúrugripasavnið



**Erla Olsen**

erla@ngs.fo
Náttúrugripasavnið



**William Simonsen**

williams@ngs.fo
Náttúrugripasavnið